# Tíðliga upp at drepa springarar

**Týsmorgunin vóru 102 springarar dripnir í Streymnesi. Drápið gekk væl, hóast tað vóru fáir bátar uppi í leikinum**

SPRINGARADRÁP

*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Tíðliga týsmorgunin vóru 102 springarar hildnir til í Streymnesi, og drápið gekk væl.

Bara fýra bátar róku springaraflokkin, men tað bar væl til, og hóast tað heldur ikki var so nógv fólk við, sum tað vanliga er til slík dráp, so spældi alt væl av.

Springararnir vórðu býtt-



*Drápið í Streymnesi gekk væl, hóast tað ikki var so nógv fólk, sum tað plagar at vera*

*Mynd: Maria Olsen*

ir millum fólkið, og tað vóru trivarligir partar at fáa hjá teimum, sum høvdu verið við í drápinum.

Náttúrugripasavnið var eisini á staðnum og tók royndir fyri hvalaveiðifelagsskapin NAMMCO.

## Nýggj loyvisnevnd sett

Landsstýrismaðurin í vinnumálum, Bjarni Djurholm, tilnevndi týsdagin nýggja loyvisnevnd.

Samsvarandi grein 9 í rúsdrekkalógini skal loyvisnevndin vera samansett av einum løgfrøðingini, einum umboði fyri løgregluni, einum umboði fyri Fyribyrgingarráðið, einum grannskoðara og einum persóni við hollum kunnleika til hotel- og restaurratiónsvinnuna. Hesin seinast nevndi skal tó ikki vera vinnurekandi innan yrkið.

Limirnir, sum eru valdir fyri eitt fýra ára skeið eru hesir: Eyðbjørn Larsen (løgfrøðingur) er formaður, Uni Vestureið (løgreglumaður), Jenny Petersen (fyribyrgingarráðið), Eilif Petersen (grannskoðari) og Ingun Schiller (fyrrverandi tænari).

Móttøka

PLATFORM

Í sambandi við at 25 ár eru liðin, síðani Jan Müller, ábyrgdarblaðstjóri og fyritaksstjóri, varð settur í starv sum blaðmaður á Sosialinum, bjóðar Sosialurin til móttøku í Platformi í Havnar Klubba fríggjadagin 29. august kl 16-18.

Sosialurin

